Størsta avbjó›ingin nakrantí›

U-18 landsli›i› fer seinnapartin í dag at spæla ímóti Italia. Venjarin heldur, at talan er um besta mótstø›uli›i› nakrantí› hjá einum føroyskum unglingalandsli›i

Føroysku U-18 dreingirnir komu hóskvøldi› í øllum gó›um ni›ur til Acona í Italia. Í gjár fóru teir undir fyrireikingarnar til EM undankappingina, og seinnapartin í dag er fyrsti dysturin á skránni. Hann er ímóti vertunum úr Italia.

– Hetta li›i› hevur spælt nógvar altjó›a dystir tey bæ›i seinastu árini. Men eg haldi meg kunna siga vi› stórari vissu, at teir hava ongantí› spælt ímóti einum so gó›um li›i sm tí, teir í dag skulu spæla ímóti.

Hetta sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá U-18 li›num:

– Italia er ein av heimsins størstu fótbóltstjó›um. Teir vóru europameistarar fyri U-18 landsli› í summar, og teir mi›ja eins høgt hesa fer›. At teir hava naka› at hava vónirnar í, var sjón fyri søgn, tá teir fyri stuttum vunnu ein venjingardyst 2-1 ímóti Brasila.

Mánadagin skulu føroysku unglingarnir spæla ímóti Onglandi, og mikudagin skulu teir spæla ímóti Andorra:

– Eg meti møguleikarnar ímóti Onglandi at vera nógv frægari enn ímóti Italia. Ímóti Onglandi rokni eg vi›, at ta› fer at bera til at taka fer›ina úr dystinum og at spæla taktiskt. Ta› vænti eg ikki fer at ganga ímóti Italia. Ímóti Andorra eiga vit at vinna. Gera vit ikki ta›, ver›a vit vónbrotnir, sigur U-18 landsli›svenjarin.

Yngri enn teir stóru

Elstu U-18 dreingirnir eru føddir í 1982. Felags fyri Italia og Ongland er, at mest um allir spælararnir hjá teimum eru føddir í 1982. Føroysku dreingirnir eru frá 1982, 1983 og onkrir eru frá 1984.

– Stóru tjó›irnar hava so nógvar ens gó›ar spælarar at velja ímillum, at ta› ikki ger mun, um ein ver›ur skaddur ella gevur avbo› av onkrari a›rari orsøk. Ta› standa einir hundra› a›rir, sum eru eins gó›ir, og bí›a eftir møguleikanum. Hjá okkum er heilt ø›rvísi, men solei›is eru treytirnar, ásannar venjarin.

Seks av teimum átjan føroysku spælarunum eru frá 1982. Teir eru málverjin Karstin Joensen, og útispælararnir Atli Gregersen, Brynjolvur Nielsen, Niels Joensen, Bergur Djurhuus og Ragnar Poulsen. 1984 árgangurin er umbo›a›ur av Jann Inga Petersen, Bár›ur Christiansen og Bjarna Jørgensen. Hinir spælararnir eru allir føddir í 1983. Ta› vil siga, at teir eisini komandi ár kunnu spæla á U-18 li›num (saman vi› teimum frá 1984). 1983 árgangurin er umbo›a›ur av Pól N. Joensen, sum er málverji, og útispælarunum Áka L. Hansen, Elfinn Ørvarodd, Atla Danielsen, Hjalgrím Elttør, Símun Joensen, Jón Róa Jacobsen, Vagnur Mohr Mortensen og Fró›a Jóanesarson.

Fimm falnir frá

Jógvan Martin Olsen hevur arbeitt vi› hesum li›num í fleiri ár. Nú li›i› er í Italia, eru f‡ra spælarar eftir í Føroyum, sum – um alt hev›i veri›, sum ta› var fyri einum ári sí›ani – høvdu veri› uppløgd evni at veri› vi› í EM undankappingini.

Ein teirra er Kristian á Lakjuni úr KÍ, sum fyrr í heyst gjørdi av at halda frí frá fótbóltinum – fyribils í hvussu so er. Ein annar er Jack Johansen úr FS Vágum. Hann er langtí›arskaddur í knænum. Ein tri›i er Arnold Berg av Skála, sum hevur tiki› hondbóltin framum fótbóltin. Sí›ani summarste›gin hevur hann kortini spælt vi› 3. deildarli›num hjá skálamonnum.

Og so er ta› Rani D. Christiansen úr HB, sum er føddur í 1984. Hann skuldi vera verjuálit á U-16 landsli›num, sum í sí›stu viku var í Hollandi. Rani spældi bara sjey minuttir. So noyddist hann at gevast, tí hann var› skaddur í knænum. Kanningar hava víst, at umframt li›bandi›, so er krossbandi› løsta›. Ta› vil siga, at ta› fer at ganga drúgv tí›, á›renn evnaríki verjuspælarin, sum Jógvan Martin Olsen hev›i ætla› at havt vi› til Italia, aftur ver›ur førur fyri at spæla fótbólt.

– Vit hava álit á spælarunum, sum vit hava vi›. Men ta› er einki at taka seg aftur í, at breiddin ikki ver›ur tann sama, tá fleiri fella frá. Eg kann í hesum sambandi eisini nevna, at vit í fjør høvdu fingi› ein álopsspælara á U-16 landsli›i›, sum eitur Sigmund Mikkelsen. Foreldrini eru av Skála og úr Havnini, tey búgva ni›ri, og Sigmund var frammarlaga millum unglingarnar hjá Brøndby. Tíverri fekk hann ein álvarsligan løst í knæi› í fjør. Krossbandi› er fari›, og ta› tekur langa tí› hjá honum at koma fyri seg aftur, sigur Jógvan Martin Olsen.

jh

Allan fer at seta met

Um Jens Martin ver›ur á beinkinum og Allan Mørkøre fer at spæla vi› í dag, so ver›ur HB ma›urin tann fyrsti, sum røkkur 52 altjó›a skrásettum landsdystum

Sí›ani Jóannes Jakobsen og Kári Reynheim góvust á landsli›num, hevur Jens Martin Knudsen veri› metma›ur hvørja fer› landsli›i› hevur spælt. Men nú sær ta› út sum um meti› hjá málverjanum av álvara ver›ur hótt.

Úr Sveis ver›ur sagt, at alt bendir á, at Jákup Mikkelsen ver›ur málverji í dag. Ta› er ikki so undarligt, tá avriki› hjá honum mánakvøldi› ímóti FCK ver›ur havt í huga. Verdensklasse, seg›i John Faxe Jensen, venjarin hjá Herfølge, og bæ›i Ekstra Bladet og BT góvu føroyska málverjanum so gott sko›smál, sum ta› sjáldan kemur fyri í donsku fjølmi›lunum.

Eingin veit betri enn Jens Martin Knudsen og Jákup Mikkelsen, at ta› kann ganga skjótt í fótbólti. Sjálvt um Jákup ver›ur ímillum stólparnar frá fyrsta bríksli í dag, so er møguleiki fyri, at Jens Martin eisini kann sleppa upp í part. Ta› vóna vit sjálvsagt ikki, tí so ver›ur ta›, tí Jákup ver›ur skaddur, ella tí hann fær rey›a korti›.

N‡tt met

Tá Slovenia var á Svangaskar›i og Føroyar sí›stu løtuna javna›u til 2-2, sat Jens Martin Knudsen á beinkinum. Allan Mørkøre var á vøllinum, og ta› hev›i vi› sær, at HB ma›urin kom upp á sí›una á Jens Martini. Teir eru bá›ir skrásettir fyri at hava spælt 51 landsdystir.

Ta› sær út til, at Allan Mørkøre seinnapartin í dag ver›ur fyrsti føroyingurin, sum fer at spæla landsdyst nummar 52. Óli Johannesen er tann, sum hevur spælt tri›i flestar landsdystir. Seinnapartin í dag ver›ur tvøráma›urin í AGF fyri 47. fer› í landsli›stroyggjuni. Todi Jónsson hevur spælt 41 landsdystir. Todi er ikki vi› í Sveis. Øssur Hansen, sum gjørdist kendur um allan heimin, tá hann vi› frágera at hava spælt 51 landsdystir.

Ta› sær út til, at Allan Mørkøre seinnapartin í dag ver›ur fyrsti føroyingurin, sum fer at spæla landsdyst nummar 52. Óli Johannesen er tann, sum hevur spælt tri›i flestar landsdystir. Seinnapartin í dag ver›ur tvøráma›urin í AGF fyri 47. fer› í landsli›stroyggjuni. Todi Jónsson hevur spælt 41 landsdystir. Todi er ikki vi› í Sveis. Øssur Hansen, sum gjørdist kendur um allan heimin, tá hann vi› frágera gó›um frísparki javna›i til 2-2 ímóti Slovenia, hevur spælt 40 landsdystir. Ta› vil vi› ø›rum or›um siga, at Øssur í dag fer at leggja seg upp á sí›una av Toda Jónsson.

Dysturin í dag er hin 69. altjó›a skrásetti landsdysturin hjá føroyingum. Higartil eru átta dystir vunnir, níggju eru enda›ir vi› javnleiki, og føroyingar hava 51 fer›ir tapt. Samla›i málmunurin er 42-180.

jh

Søguligt á Wembley

Noreg og Ísland hava knívin á barkanum, tá grannatjó›irnar vitja í ávikavíst Wales og Kekkia

Allar nor›urlendsku brø›ratjó›irnar eru í vikuskiftinum í fótbóltseldinum. Áhugin er stórur, og hóast talan bara er um anna› umfari› í n‡ggju HM undankappingini, so ver›ur í fleiri førum tosa› um lagnudystir.

Danmark er í Nor›urírlandi. Eftir sigurin í Íslandi og sannførandi fyrstu fyrstu fetini vi› Morten Olsen og Michael Laudrup vi› ró›ri›, er lagi› gott í danska fer›alagnum:

– Vit hava gó›ar møguleikar at vinna, men vit eru bæ›i í Føroyum og í Íslandi mintir á, at ta› er torført á útivølli at vinna á fótbóltstjó›um, sum hava veri› mettar at hoyra til ímillum tær minstu, siga teir í danska fer›alagnum.

Íslendingar eru í Prag. Fyri júst einum ári sí›ani vístu føroyingar, at ta› ber til at geva Kekkia dygga mótstø›u í Prag. Um íslendingar skulu hava nakran møguleika at gera seg galdandi í bólki 3, so ber ta› teimum illa til at koma til hús aftur vi› ongum stigi. Ísland fer at verja og dúva upp á snarálop.

Tri›i dysturin í bólki 3 ver›ur í Sofía, har Bulgaria hevur vitjan av Malta.

Svøríki hevur heimavøll ímóti Turkalandi. Svøríki má metast at vera favorittur, men Turkaland er nógv ment á altjó›a stø›i, sí›ani teir í 1991 vóru í Gundadali og spældu 1-1. Hinir dystirnir í bólki 4 eru Makedonia-Aserbadjan og Moldova-Slovakia.

Finnland hevur eina torføra uppgávu á skránni í Grikkalandi. Eftir hálvvánaliga fyrsta dystin kennir Noreg, sum vitjar í Wales, tr‡st á sær. Hinir dytirnir í bólki 5 eru Armenia-Ukreina og Pólland-Hvítarussland.

Søguligt á Wembley

Grikkaland og Finnland eru í undankappingarbólki 9. Favorittarnir í tí bólkinum eru T‡skaland og Ongland. Europeiska søgan hevur tey seinastu nógvu øldirnar snara› seg um hesi bæ›i londini. Eisini í fótbólti hava strí›ini veri› stór og kend, og áhugin fyri dystinum í dag er einki undantak.

Í Onglandi eru teir komnir so miki› ávegis vi› ætlanunum um at n‡mótans gera tjó›arleikvøllin, at uppfer›in ímóti T‡skalandi ver›ur tann sí›sta yvirhøvur á gamla Wembley. Hana vilja onglendingar vinna.

– Um Ongland skal hava nakran møguleika at sleppa upp í part í HM endaspælinum, skulu teir vinna ímóti T‡skalandi. Vinnur Ongland ikki, so ver›ur útidysturin ímóti Finnlandi komandi mikukvøld ein spurningur um lív ella dey›, vísir Terry Venables á.

Grannastrí›

Me›an føroyingar spæla í Sveis, ver›ur ein sera áhugaverdur dystur í Liktinstein, har føroyingar 26. apríl vunnu 1-0 í einum venjingardysti. Eysturríki vitjar í Vaduz. Eysturríkarar vita alt um, hvussu ta› kennist at tapa 1-0 ímóti einari pinkutjó›. Um ta› eydnast Liktinstein í bólki 7 at fáa stig ímóti grannunum úr Eysturríki, so ver›ur talan um eina størri sensatión, enn tá føroyingar fyri tíggju árum sí›ani vunnu 1-0 í Landskrona.

Í sama bólki fær Spania vitjan av Ísrael.

Í bólki 8 ver›ur spælt solei›is: Litava-Georgia og Italia-Rumenia. Í bólki 2 eru dystirnir hesir: Portugal-Írland, Andorra-Estland og Kypros-Holland.

jh

Gullbrúdleyp

Mánadagin 9. oktober hava hjúnini Sonja og Jógvan (Egga) Rasmussen, Strendur, gullbrúdleyp. Vælkomst verður í kelduni í Skálafirði kl. 19.00.

Prógv

Anna Hammer, Tórshavn, hevur lokið prógv sum social- og sundhedsassistent á Social- og sundhedsskolen í Keypmannahavn.

Konfirmantar 8. okt. í Vesturkirkjuni

Rannvá Lamhauge Beder, á Teigi 8, 100 Tórshavn
Ragnhild á Plógv Hansen, Bóndaheygur 9, 100 Tórshavn
Gyða Barbara Jacobæus, Fjalsgøta 46, 100 Tórshavn
Símona Bjarkadóttir Jensen, Heiðatún 9, 160 Argir
Benadikta Johannesen, Jákup Dahlsgøta 1, 100 Tórshavn
Lisa í Garði Patursson, 175 Kirkjubøur
Randi Skylvsdóttir Wardum, Undir Gráasteini 32, 100 Tórshavn
Marno Havstein Andreasson, Traðagøta 1, 160 Argir
Bogi Augustinussen, Suðurstíggur 12, 160 Argir
Niclas Olaf Martinsson Berg, Øksnagerði 1B, 100 Tórshavn
Tummas Petur Bisp, Guttormsgøta 12, 188 Hoyvík
Rani Gregoriussen,Granagøta 16, 100 Tórshavn
Rógvi Nolsøe Hansen, Folagerði 11, 100 Tórshavn
Fríði Johan Jacobsen, Brattalíð 20, 100 Tórshavn
Nicodemus Rasmussen Líggjasson, Lambagerði 5, 100 Tórshavn
Dánjal Michaelsen, Undir Gráasteini 5, 100 Tórshavn
Helgi Debes Michelsen, Hvannasundsgøta 4, 100 Tórshavn
Bjarti Nattestad Petersen, Suðuroyarvegur 8, 100 Tórshavn

Konfirmantar 8. okt. í Havnar kirkju

Pól Andreassen, Traðarvegur 7
Rógvi Danielsen, Korkagøta 1
Tormóður Djurhuus, Millum Gilja 3
Rani Ellingsgaard, Javnagøta 3
Heini Aabak Hansen, Marinargøta 16
Hallur Helmsdal, Lýðarsvegur 3
Jón Klæmint Hofgaard, Berjabrekka 201
Sonni Annfinnsson Jacobsen, Niðaragøta 60
Niels Tórur Eysturtún Jensen, Villingardalsvegur 19
Gunnar Joensen, Aggusteinusvegur 3
Kenneth Joensen, Onnugøta 8
Kári Holm Johannesen, Turiðargøta 14
Rói Wardum, Lýðarsvegur 10
Rói Debes Winthereig, Turiðargøta 8
Uni Debes Winthereig, Turiðargøta 8
Durita Dahl Andreasen, Millum Gilja 60
Anna Berg, Børkugøta 4
Katrina Clementsen, Korkagøta 13
Herbjørg Leila Eliasen, Gillagøta 15
Anna Knútsdóttir Gray, Móritsarvegur 9
Aimee Hansen, Eystari ringvegur 10B
Lilian Hellisdal, Smærugøta 9 C
Bára Jákupsdóttir Jakobsen, Láarvegur 18
Ása Dam á Neystabø, Børkugøta 29
Joan Jastrid Simonsen, Traðarbrekka 2
Hilma Sofía Skarðheim, 410 Kollafjørður

Konfirmantar 8. okt. kl. 11 í Tvøroyrar kirkju

Eir Lisberg, Øravík
Elin Kristianna Haugaard Lisberg, Sjúkhúsbrekkan
Irena Harriette Jespersen, í Líðini
Birita í Dali, við Rangá
Lív Steinkross, í Trongisvági
Bára Thorsteinsson Djurhuus, í Trongisvági
Janus Jespersen, í Líðini
Karl Andras Poulsen, í Fámjin
Nils Martin Olsson Djurhuus, á Tanganum
Sjúrður Mortan Thorsteinsson, á Trovheyggi
Kristian Eli Holmsund, í Trongisvági
Jóhan Petur Jacobsen, í Valinum

Konfirmantar 8 okt. í Vestamanna kirkju

Birita Sofía Hendriksdóttir
Gunn Himmeland Jacobsen
Arnleyg Victoria Johansen
Elisabeth Petersen
Herborg Silja Strøm
Sigrið Zachariasen
Sebastian Eriksen
Heini Mohr Johansen
Hans Fríðálv Johannesen



KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Ann-Elisabeth Joensen
Varðabú 34
100 Tórshavn

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: TOKUHORN



Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. …«** á bjálvan.

245

Loysunar-
orðið: .....
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Út í leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Kalr N. Hansen týddi*

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Grønur var dalurin** - *Richard Llewellyn/ Knút Olsen týddi*
- ❑ **Tit bygdu hetta land - Arbeiðsmarknaðurin** - *Jákup Pauli Strøm*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Frumsagnir** - *Neil Philip/Amy Tausen týddi*
- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt